almannaverkið

| | |
|---|---|
| Almannamálaráðið<br>Eirargarður 2<br>100 Tórshavn | **Tórshavn, tann:** 14. november 2019<br><br>**J.nr.:** 610.K04-0035/19<br>(at tilskila í svari)<br><br>**Tygara skriv.:**<br><br>**Viðgjørt:** Birgit Vitalis Ottosen |

**Hoyringsviðmerkingar til uppskot til broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., uppskot til broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum og uppskot til broyting í løgtingslóg um áseting av skatti**

Almannamálaráðið hevur við telduposti tann 4. november 2019 sent Almannaverkinum omanfyri nevndu lógaruppskot til hoyringar.

Almannaverkið hevur hesar viðmerkingar til uppskotini.

Fyri greidleikan hevði verið ynskiligt, at tað framgekk av talvunum, sum vísa munin í inntøku um mánaðin millum galdandi lóg og lógaruppskotið, hvussu stórur partur av inntøkuni er fólkapensjón, útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og hvussu stórur partur er onnur inntøka.

*Uppskot til broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.*
Í gildiskomuni stendur, at lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Mælt verður til at áseta, nær lógin hevur virknað frá.

Til almennu viðmerkingarnar
Í talvu 2 á síðu 6 stendur, at viðbótin til giftar pensjónistar er 36.372 kr. Hetta skal vera 42.444 kr. Samanteljingin av inntøku er røtt í mun til 42.444 kr.

Sama talva verður víst á síðu 5 og á síðu 7 í viðmerkingunum til uppskot um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Vinaliga

Birgit Vitalis Ottosen

Birgit Vitalis Ottosen
ráðgevi

Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn • Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo